## Mintust Edmund Hillary

Sherpar í Nepal mintust í gjár Edmund Hillary, sum var fyrsti maður niðan á Mount Everest saman við Tanzing Norgay, og sum doyði í síðstu viku. Minningarhaldið var í Katmandu, og tað vóru buddhistiskir munkar, sum skipaðu fyri tí. Edmund Hillary brúkti ein part av lívi sínum til at stuðla ymsum menningartiltøkum í Nepal so sum at byggja skúlar, sjúkrahús, heilsumiðstøðir og brýr. Hann var 88 ára gamal, nú hann doyði.



## Saybia avlýsir ikki

Hóast sangarin í Saybia, Søren Huss, misti konu sína Camillu í eini syndarligari ferðsluvanlukku 17. desember 07, so verður hann longu aftur á pallinum saman við Saybia 22. februar 08. Fólk høvdu hálvavegna væntað, at konsertirnar hjá bólkinum fóru at verða avlýstar, men so er ikki. Tvørturímóti hevur Saybia kunngjørt, at teir seta tvær konsertir afturat á skránna. Fyrstu konsertirnar verða á norska festivalinum "Uken 08".

# Gott sjúkrahús kostar nóg

**Tilvild hevur stýrt menningini av føroyska heilsuverkinum, og politikarar eru ikki uppgávu sína búnir, tá teir framvegis ikki hava sett sjúklingtrygd í gildi, tá teir fasthalda trý sjúkrahús og nú eisini eru farnir at tosa um viðgerðartrygd. Hetta sigur Jón á Steig, sum um árskiftið fór frá sum medisinskur yvirlækni á Landssjúkrahúsinum eftir 30 ár í starvinum**

HEILSUVERK
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Í samband við starvsfólkamangul og royndirnar at fáa starvsfólk at trívast heldur Jón á Steig, at áhaldandi atfinningarnar hjá føroysku miðlunum kunnu skaða meira enn tær bøta. - Um ein lækni verður svínaður til í pressuni, so kann hann bara taka flúgvaran og fara. Hvør orkar bara at fáa neiliga umrøðu, spyr hann*

Spurdur um hvat størsta framstigið hevur verið hesi árini, hann hevur starvast á Landssjúkrahúsinum, svarar fyrrverandi medisinski yvirlæknin, Jón á Steig, at tað var høvdaskannarin, sum tey fingu frá privatum banka í mitt í fýrsunum.

At týdningarmesta nýggja tólið kom sum privat gáva passar væl til myndina, sum Jón á Steig teknar av samskiftinum millum heilsuverkið og politisku skipanina.

- Tað hevur mangan undrað meg, at proffesionella ráðgevingin ikki kemur upp ígjøgnum politisku skipanina. Ofta er tað tilvildin, sum hevur gjørt, at vit hava kunna ment okkum, staðfestir hann.

- Tá ynskilistin fyri nýggj tól skal gerast á hvørjum ári, snýr tað seg meira um at strika út enn at skriva niður, tí fíggjarætlanin skal ikki vaksa, samstundis sum prísir og lønir vaksa fyri hvørt ár.

Ein av tólunum, sum varð strikað í fleiri ár, var ein ultraljóðskannari. Og Jón á Steig greiðir frá, hvussu Landssjúkrahúsið at enda fekk henda skannara. Tann søgan gongur fyri seg umborð á einum trolara.

- Vit stóðu uppi á brúnni á einum nýkeyptum trolara, og eg sigi við skiparan, at hann kundi saktans, tí skipið hevði ekkolodd. Tað var júst ein slík maskina, sum vit manglaðu á Landssjúkrahúsinum. Har vóru fleiri politikkarar á brúnni eisini, og onkur teirra spurdi inn til hetta, og eg greiddi frá, hvussu góður ein ultraljóðskannari er, og at hann virkar eftir sama prinsippi sum ekkoloddi.

- Árið eftir varð ultraljóðskannarin játtaður á fíggjarlógini, sigur Jón á Steig og flennir.

### Frá strekk til deyðssong

Sum smádrongur skrivaði Jón á Steig í eina poesibók, at hann ynskti at verða lækni. Ynski gjørdist veruleiki, og fyrrverandi medisinski yvirlæknin kann í dag hyggja aftur á eitt arbeiðslív, sum bæði hevur verið spennandi og avbjóðandi.

At hann ynskti at verða lækni var kanska ikki so løgið. Frá tí at hann var seks ára gamal lá Jón á Steig fleiri ár á Drotning Ingridar Hospital, sum tað tá æt. Hetta var undir kríggjum og nøkur ár fram. Annað beinið lektist ikki, og tí lá hann einsamallur í Havn langt frá familjuni í Vágum.

Tá smádrongurin fylti sjey, setti læknin ein lærara at undirvísa honum, og annars var gerandisdagurin hospitalið, har menn løgu strekk við tuberklum í áravís, og stovugongdin var eitt heilt herðlið við sjúkrasystrum sum fortroppi framman fyri høgtmetta læknanum við virðiligu yvirsjúkrasystrini í hølunum.

- Ja, nógv er broytt síðani tá, sigur Jón á Steig smílandi.

- Í dag gongur mann og pjøssar við sínum testskopi og prátar stillisliga við sjúklingin. Fyrr var lítil samrøða, bara harraboð

- Pensilin, medisin fyri tuberklar og medisin fyri magasár hava kollvelt gerandisdagin á sjúkrahúsum, greiðir hann frá. Um ein maður kom inn við magasári fyrr, so skuldi hann liggja inni til kur í seks vikur, í dag fær hann bara medisin við heim.

Men meðan talið av sjúklingum í medisinskari viðgerð er fallið, er talið av doyggjandi økt.

- Fyrr vildu sjúklingar heim til familjuna at doyggja. Tey befalaðu seg í Harrans hendur og vildu vera hjá sínum kæru tað seinasta tíðina. Í dag fáa vit doyggjandi sjúklingar frá røktarheimum, og so liggja tey seinastu tímarnar hjá okkum, sigur Jón á Steig hugsunarsamur.

### Einki land ráð til heilsuverk

Stóru frambrotini innan heilsuøki hava ført við sær, at tørvurin er vorðin ómettandi. So nógv kann gerast, og øll ynskja at liva so væl og leingi sum møguligt.

- Einki land í verðini hevur ráð til at tað, sum eitt heilsuverk kann kosta, staðfestir Jón á Steig og nevnir sum dømi, at metingar vísa, at um amerikanska heilsuverkið heldur fram at vaksa í sama mun, sum tað hevur gjørt seinastu árini, so fer amerikanska samfelagið fallitt um nøkur fá ár.

- Men tá tú sum lækni stendur yvir fyri tí einstaka, so gert tú alt, sum tú kanst fyri at hjálpa. Tað er so lætt at tosa yvirskipað, tá mann ikki stendur yvir fyri einstaka menniskjanum, sigur Jón á Steig, sum tó leggur herslu á, at politikkarar hava ábyrgd fyri at gera nakrar raðfestingar og geva fígging hareftir.

- Hóast sjúklingar koma inn á okkum dag og nátt, so hevur leiðslan megnað at hildið fíggjarætlanina við bara promillum omanfyri tað, sum verður fyriskrivað. Tá politikkarar tosa um, at Landssjúkrahúsið ikki heldur fíggjarætlanir er tað tí púra burturvið, heldur Jón á Steig.

Spurdur um vit eiga at góðtaka, at vit eru ov smá til at hava eitt veruligt heilsuverk og heldur royna at gera brúk av samstarvavtalum við stór, vælvirkandi sjúkrahús uttanlands, sigur Jón á Steig, at tað ber ikki til at flyta øll.

- Men vit mugu gera eina raðfesting um, hvat vit skulu hava - ella hvat vit skulu góðtaka at vit ikki hava - sigur hann og nevnir sum dømi nýra-, hjarta- og lungna kirurgi, sum vit ikki eiga at hava nakrar vónir um at hava í Føroyum.

Eisini heldur hann tað vera sera heppið fyri okkum at vit hava eitt so gott samstarv við ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn, sum er eitt universitetssjúkrahús.

- Vit mug ikki bara sleppa hesum góða samstarvi fyri samstarv við útjaðarasjúkrahús í Skotlandi ella aðrastaðni, sig Jón á Steig avgjørdur.

### Kvalitet heldur enn nærleika

Jón á Steig er eisini avgjørdur, tá prátið kemur inn á tey trý sjúkrahúsini. Hann staðfestir, at tað er púra burturvið at halda, at 48.000 fólk kunnu bera trý sjúkrahús.

- Hetta er fakliga ófortsvarligt.

- Í Danmark siga tey, at minst 250.000 fólk skulu vera til hvørt sjúkrahús, og 48.000 kunnu kanska so dánt uppihalda eitt Landssjúkrahús hjá okkum.

- Heilsuverkið má ikki vera »beskæftigelsesterapi«, bara fyri at geva arbeiðið til nøkur starvsfólk. Tað snýr seg um at veita bestu góðskuna til brúkarnar, tað vil siga sjúklingarnar. Vit mugu hugsa um kvalitet heldur enn nærleika, sigur hann. Og eitt stórt sjúkrahús gevur hægri fakligt støði, tí har er møguleiki at skapa eitt fakligt umhvørvið, har fleiri læknar og fakfólk kunnu sparra.

- Eg hevði ikki tora at staðið sum einsamallur lækni í Klaksvíkar og Suðuoyar Sjúkrahúsi. Eg geri alt mítt arbeiði í samstarv við mínar samstarvsfelagar, men tað kann ein einsamallur lækni